

# Summar Festivalur fyri øll



Fjórði Summar Festivalurin er fyri framman, og vit eru mong, sum gleða okkum til hetta stóra tiltak. Ikki minst, tá ið hugsað verður um, hvussu væl eydnaðir undanfarnu festivalar hava verið.

Áhugin fyri Summar Festivalinum hevur verið vaksandi, og tað hevur verið hugaligt at uppliva, at fólk í øllum aldri hugna sær í Klaksvík stóra festivalvikuskiftið í august. Umráðandi er, at tað framhaldandi verður hildið fast um, at Summar Festivalurin er eitt tiltak fyri øll fólk – børn sum ung, tilkomin sum eldri.

Aftur í ár hava fyrireikararnir spíla seg út fyri at gera festivalin betri, og tað sæst aftur. Stóra navnið á festivalinum hesaferð er Scorpions, og tað er hugaligt at staðfesta, at ein bólkur sum Scorpions, sum ferðast runt til heimsins størstu býir at spæla á risastórum konsertum, kemur til Føroya at spæla og harvið er við til at seta Klaksvík og Føroyar á heimskortið millum tey stóru.

Samstundis sum hesin heimskendi bólkur kemur á Summar Festivalin at spæla, verður eisini syrgt fyri, at børnini fáa ein góðan festival. Vit fegnast um, at tað hevur eydnast at fáa størstu barnastjørnuna í Norðurlondum, Amy Diamond, á festivalin at syngja fyri børnunum, og samstundis verður Silvaland – spælilandið hjá teimum smáu – gjørt enn betri og meira spennandi.

Og afturat teimum spennandi gestunum úr útlandinum, spæla nógvir av okkara bestu tónleikarum og bólkum á Summar Festivalinum, og hetta kann enn einaferð leiða okkum til at staðfesta, at Summar Festivalurin er ein festivalur fyri øll – og øll syngja við.

Eg ynski øllum ein góðan Summarfestival.

*Eyðfinn Reyðberg,*
*Stjóri í Norðoya Sparikassa*


**Festivalblaðið 2007**

**Serblað í Sosialinum í sambandi við Summar Festivalin 2007**

www.summarfestivalur.fo
post@summarfestivalur.fo

**Útgevari:**
Sosialurin

**Myndir:**
Álvur Haraldsen
Jens Kr. Vang
Ólavur Frederiksen
Anton Højgaard
Bárður Lydersen
Robert Waagstein
Símun á Høvdanum
Polfoto
og onnur

**Umbróting:**
Sosialurin

**Prent:**
Dansk AvisTryk a/s